| | | |
|---|---|---|
| | **TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ**<br>**27. mars 2008** | Blað nr.:<br>7334 |
| | | Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** **27. mars 2008** **kl. 17.30**
**Stað:** **Fundarhølið í Ráðhúsinum**
**Málsnr: 67/08-80/08**

**FUNDARLEIÐARI:**
**Heðin Mortensen**

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Jógvan Arge
Leivur Hansen
Marin Katrina Frýdal
Hildur Eyðunsdóttir
Elin Lindenskov
Bjarti Mohr
Halla Samuelsen
Inga Dahl
Beate L. Samuelsen
Sjúrður Olsen
Høgni Mikkelsen
Jan Christiansen
Heðin Mortensen

**LUTTÓK IKKI:**

**LUTTÓK EISINI:**

**SKRIVARI:**
Jens M. Poulsen

**PROTOKOLLFØRARI:**
Janus Isfeldt

**MÁL FYRI OPNUM HURÐUM, KL. 18.00:**

**Býráðsformaðurin setti fundin og las upp dagskránna.**

**69/08** **2004-0558**

**Mál um 10. flokk**

Á fundi í mentamálanevndini 8. februar 2006 samtykti nevndin at heita á skúlastjórarnar í framhaldsskúlunum í Tórshavnar kommunu at velja fimm fólk í ein arbeiðsbólk at viðgera 10. flokk.

Arbeiðssetningurin hjá bólkinum var soleiðis orðaður:

*Arbeiðsbólkurin verður biðin at koma við uppskoti, hvussu 10. flokkur skal verða skipaður undirvísingarliga í framtíðini, og um hann skal verða skipaður í eina eind ella fleiri eindir.*

Heitt varð á arbeiðsbólkin at lata mentamálanevndini uppskotið í seinasta lagi 15. mai 2007.

**Í arbeiðsbólkin vórðu tilnevnd:**
Eyðdis Eidesgaard, formaður, umboð fyri skúlastjórarnar
Jacob Thomsen, lærari í Tórshavnar Kommunuskúla
Símun Joensen, lærari í Eysturskúlanum
Birgir Mortensen, lestrarvegleiðari í Handilsskúlanum í Havn, umboð fyri miðnámskúlarnar
Joel undir Leitinum, stjóri í Samskip, umboð fyri vinnulívið
Høgni Joensen, skrivari, umboð fyri býráðið

Álitið um 10. flokk verður framlagt á fundinum.

**Mentamálanevndin 2. oktober 2007:** Høgni Joensen, skrivari í arbeiðsbólkinum, legði álitið fram.

**Niðurstøða hjá arbeiðsbólkinum**
Arbeiðsbólkurin er samdur um, at neyðugt verður at tillaga 10. flokk til nýggjar tíðir og nýggjar avbjóðingar, og at hugburðurin um 10. flokk skal broytast frá at vera endin á fólkaskúlanum til at verða byrjanin til eina útbúgving.

Í 10. flokki skulu næmingar uppliva eitt øðrvísi skúlaár, har hann/hon hevur ávirkan, setur saman og fullførir sítt skúlaár. Er virkin í einum dynamiskum ungdóms- og útbúgvingarumhvørvi, har dentur verður lagdur á tað fakliga og at vera við at taka avgerðir undir felags ábyrgd, har álit og virðing eru lyklaorð.

Men arbeiðsbólkurin er ikki fullsamdur um eitt felags tilmæli. Annað tilmæli er tí frá einum meiriluta: Eyðdis Eidesgaard, Símuni Joensen, Joel undir Leitinum, Birgiri Mortensen og Høgna Joensen og hitt frá einum minniluta: Jákupi Thomsen.

Meirilutin heldur, at í Tórshavnar kommunu skulu allir 10. floks næmingar verða savnaðir í ein depil, sum skal geva teimum, ið taka av tilboðnum, eitt spennandi og fjølbroytt skúlaár, har tey koma at hitta nýggjar floksfelagar og lærarar og leggja lunnar undir framtíðarlesnað og framtíðaryrki.

10. floksdepilin skal *ikki verða partur* av einum øðrum skúla, men verður ein sjálvstøðugur skúli við egnari leiðslu og lærarum.

Neyðugt verður at seta ein skúlaleiðara og ein varaskúlaleiðara, eitt skrivstovufólk og uml. 10-12 lærarar, sum burturav undirvísa í 10. floksdeplinum. Væntast skal, at tveir lærarar eisini hava útbúgving sum lestrarvegleiðarar. Hinir lærararnir skulu í høvuðsheitum tryggja, at næmingarnir verða undirvístir í lærugreinum og breytum.

Minnilutin mælir til, at 10. flokkarnir verða skipaðir í tvær skúlaeindir. Onnur skúlaeindin verður knýtt at Kommunuskúlanum og hin at Eysturskúlanum. Næmingarnir, ið ganga í Argja skúla og í Venjingarskúlanum, skulu sjálvir gera av, hvørja skúlaeind teir velja.

## Tilmæli frá arbeiðsbólkinum um 10. flokk

### Meirilutatilmæli
Eyðdis Eidesgaard, Símun Joensen, Joel undir Leitinum, Birgir Mortensen og Høgni Joensen.

### Skúlaeindin
Meirilutin í arbeiðsbólkinum mælir til at savna allar 10. floks næmingarnar í Tórshavnar kommunu í ein sjálvstøðugan skúladepil frá skúlaárinum 2008/2009 við egnari leiðslu og lærarum, sum burturav arbeiða í hesum skúla.

Mælt verður eisini til, at 10. floksdepilin fyribils verður í e-lonini í Eysturskúlanum, men við framtíðini í huga, eigur at verða miðað eftir at byggja ein nýggjan 10. floksdepil í Marknagili.

**Lærarar**
Lærarar, sum eru hugaðir at undirvísa í 10. floksdeplinum, skulu hava møguleika at søkja um farloyvi úr skúlanum, har teir eru í føstum starvi. Farloyvi skal í minsta lagi verða játtað í 2 ár.

**Skipanin**
Hvussu 10. flokkur skal verða skipaður undirvísingarliga, mælir arbeiðsbólkurin til at varðveita breytatilboðini og starvslæruna. Temalestur og brúgvasmíð skal eisini standa næmingunum í boði. Brúgvasmíð skulu verða skipað formliga.

Føroyskt, enskt og støddfrøði verða kravdar lærugreinir. Danskt, týskt, alisfrøði, evnafrøði, átrúnaður (religión), samtíð, lívfrøði og landalæra verða vallærugreinir. Hetta krevur lógarbroyting.

Tveir tímar um vikuna verða settir av til "floksins tíma", har næmingurin m.a. fær høvi at hitta sín kontaktlærara ella arbeiða við síni verkætlan. Kontaktlærarin hevur ábyrgd av 12-15 næmingum. Flokslæraraskipanin verður tikin av, tí næmingarnir verða undirvístir í bólkum heldur enn í flokkum.

Tað skal verða tvungin uppmøting og skylda at lata inn skrivligar uppgávur.

Næmingunum eigur at standa í boði at taka ella gera fráfaringarroynd fólkaskúlans betri, t.e. 9. flokkur, og taka víðkaðu fráfaringarroynd fólkaskúlans, t.e. 10. flokkur í føroyskum, donskum, enskum, týskum, støddfrøði, alisfrøði og evnafrøði.

**Minnilutatilmæli**
Jákup Thomsen.

Minnilutin í arbeiðsbólkinum mælir til, at 10. flokkarnir verða skipaðir í tvær skúlaeindir.

Grundgevingin er, at tað er týdningarmikið, at næmingarnir ikki verða miðsavnaðir í eina eftir føroyskum viðurskiftum ov stóra eind, tí tá er vandi fyri, at menningin og fjølbroytnið í skipanini ikki verða tryggjað nóg væl.

Við tveimum skúlaeindum, ið ikki eru ov stórar, verður fakliga og sosiala samveran ímillum næmingar og lærarar betur tryggjað, og tískil er lærarin betur førur fyri at hjálpa tí einstaka næminginum. Víst verður eisini á, at tað er týdningarmikið fyri menningina at hava tvær eindir, sum kappast um at geva næmingunum tey bestu tilboðini.

Minnilutin mælir til, at onnur skúlaeindin verður knýtt at Kommunuskúlanum og hin at Eysturskúlanum. Næmingarnir, ið ganga í Argja skúla og teir í Venjingarskúlanum, skulu sjálvir gera av, hvørja skúlaeind teir velja at fara í. Annars tekur minnilutin í høvuðsheitum undir við uppskotinum, hvussu undirvísingin í framtíðini verður skipað, og at skúlaeindirnar framvegis samstarva um breytatilboðini.

**Tilmæli frá trivnaðarfyrisitingini**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka undir við tilmælinum hjá meirilutanum um at savna allar 10. floks næmingarnar í Tórshavnar kommunu í ein sjálvstøðugan skúladepil í e-lonini á Eysturskúlanum við egnari leiðslu og lærarum, sum burturav arbeiða í hesum skúla.

**Grundgeving:**
Vísandi til álitið meta trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin, at ov fáir næmingar eru til at skipa tvær 10. flokseindir við nøktandi undirvísingartilboði.

Í álitinum verður staðfest, at tað í dag er ein stórur trupulleiki at fáa lærugreinir lisnar, tí næmingagrundarlagið er ov lítið. At skipa 10. flokkarnar í tvær eindir broytir lítið upp á hetta.

Endamálið við 10. flokki er, at næmingurin meira enn áður skal kunnu seta saman sína egnu útbúgving. Bert við einum rímiliga stórum næmingagrundarlagi kunnu skúlarnir bjóða nøktandi lærugreina- og breytartilboð.

Í skúlaárinum 2006/2007 góvust nærum ¼ av næmingunum í 10. flokki, tað svarar til tveir heilar flokkar. Hetta er dýrt fyri kommununa, fyri landið og ikki minst menniskjaliga fyri einstaka næmingin.

Skulu vit megna at broyta hugburðin til, at 10 flokkur skal verða byrjanin til eina útbúgving heldur enn endin á fólkaskúlanum, krevst nýhugsan á skúlaøkinum. Skal tað eydnast at skipa eitt kveikjandi læru- og ungdómsumhvørvi fyri næmingarnar í 10. flokki og byggja brúgvar til aðrar útbúgvingarstovnar og vinnulívið, verður neyðugt at broyta verandi skúlabygnað, soleiðis at 10. skúlaárið verður ein sjálvstøðug skúlaeind.

Býráðið hevur tikið avgerð um at skipa nýggju skúlarnar í kommununi úr 1. upp í 9. flokk. Rætt er at lata hendan leistin galda fyri allar skúlar í kommununi, og skipa eina sjálvstøðuga 10. flokseind at taka ímóti næmingum úr øllum skúlunum við tí fyri eyga, at 10. flokkur verður byrjanin til eina útbúgving.

Hølisliga letur tað seg gera at skipa 10. flokk í eina sjálvstøðuga eind í e-lonini í Eysturskúlanum. Har eru góð undirvísingarhøli, serstovur, bókasavn o.a. Fortreytir, sum gera, at møguleikar eru at skipa eitt gott og mennandi umhvørvi hjá bæði næmingum og lærarum.

Í Tórshavnar Kommunuskúla eru sum er trongir høliskarmar. Tí ber illa til at ímynda sær, at tað fer at bera til at skapa nóg góðar og spennandi umstøður til enn fleiri næmingar.

**Mentamálanevndin 23. oktober 2007:** Málið umrøtt og útsett til ein seinni fund.

**Býráðið 25. oktober 2007:** Tikið av skrá.

***Uppískoyti:***
Týsdagin 29. januar 2008 høvdu tey ellivu skúlastýrini í Tórshavnar kommunu felagsfund um álitið *"10. flokkur – ein øðrvísi skúli"*, ið arbeiðsbólkur á heysti 2007 handaði mentamálanevndini.

Undan fundinum høvdu skúlastýrislimir, býráðslimir og onnur fingið álitið at lesa ígjøgnum.

Eftir framløguni frá arbeiðsbólkinum var orðaskifti um álitið, og fingu skúlastýrini fjúrtan dagar at ummæla og viðgera tilmælini í álitinum og koma aftur til arbeiðsbólkin við sínum tilmælum og viðmerkingum.

Tíggju skúlastýri hava gjørt viðmerkingar til álitið, og eru tey øll samd um at taka undir við tilmælinum frá meirilutanum í arbeiðsbólkinum, sum mælir til at skipa 10. flokk í ein sjálvstøðugan skúla við egnari leiðslu og lærarum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við skúlastýrunum at skipa 10. flokk í ein sjálvstøðugan skúla við egnari leiðslu og lærarum í e-lonuni á Eysturskúlanum, frá skúlaárinum 2009/2010 at rokna.

**Mentamálanevndin 5. mars 2008:** Ein meiriluti, Hildur Eyðunsdóttir, Jógvan Arge, Halla Samuelsen og Inga Dahl, samtykti at taka undir við tilmælinum frá trivnaðarstjóranum og mentamálaleiðaranum um at skipa 10. flokk í ein sjálvstøðugan skúla við egnari leiðslu og lærarum í e-lonuni á Eysturskúlanum, frá skúlaárinum 2009/2010 at rokna.

Ein minniluti, Beate L. Samuelsen, tekur undir við tilmælinum, tó soleiðis at byrjað verður frá skúlaárinum 2010/2011 at rokna.

**Býráðið 27. mars 2008:** Fyrst varð atkvøtt um meirilutatilmælið frá mentamálanevndini ið fall við 5 atkvøðum fyri og 6 atkvøðum ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Kathrina Frýdal og Elin Lindenskov.

Ímóti atkvøddu: Inga Dahl, Bjarti Mohr, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

Greiddu ikki atkvøðu: Leivur Hansen og Halla Samuelsen

Síðan varð atkvøtt um minnilutatilmælið frá mentamálanevndini, ið varð einmælt samtykt.

**70/08** **2008-0590**

**Gøtunavn til vegin millum Løgmannabreyt og Karlamagnusarbreyt**.

**Gøtunavnanevndin 31. januar 2008:** Vegurin millum Løgmannabreyt og Karlamagnusarbreyt fær navnið:

**Atlagøta**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at góðtaka uppskotið og beina málið í býráðið.

**Mentamálanevndin 5. mars 2008:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá trivnaðarstjóranum og mentamálaleiðaranum og beina málið í býráðið.

**Býráðið 27. mars 2008:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**71/08** **2008-0591**

**Gøtunavn til útstykkingina eystan fyri Karlamagnusarbreyt og norðan fyri Hoyvíkar skúla**

**Gøtunavnanevndin 31. januar 2008:** Útstykkingin eystan fyri Karlamagnusarbreyt og norðan fyri Hoyvíkar skúla fær navnið:

**við Myllutjørn**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at góðtaka uppskotið og beina málið í býráðið.

**Mentamálanevndin 5. mars 2008:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá trivnaðarstjóranum og mentamálaleiðaranum og beina málið í býráðið.

**Býráðið 27. mars 2008:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**72/08** **2004-1649**

**Umsókn frá MAP arkitektum, vegna Almanna- og heilsumálaráðið, dagf. 18.juni 2004, um broyting av Almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu og loyvi til frámatrikulering.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Almanna- og heilsumálaráðið hevur ætlanir um at selja íbúðarbygningarnar, sum standa á økinum hjá Landssjúkrahúsinum á matr. nr. 100a, Tórshavn. Bygningarnir eru 4 í tali, harav ein verður nýttur til umsiting hjá Almanna- og heilsumálaráðnum.

Økið hjá Landssjúkrahúsinum er í Almennu byggisamtyktini útlagt sum D3 øki, sum er kannað stórum almennum stovnum fyri umsiting, skúlaskap, heilsurøkt og tílíkt.

Ætlanin er at frámatrikulera og selja íbúðarbygningarnar til privat útleiðingarvirksemi.

Tá D3 økið ikki loyvir privatum leiguíbúðum, er ætlanin at fáa broytt økið til A2 øki, sum í Almennu byggisamtyktini er útlagt til høga bústaðarbygging, tó skal viðmerkjast, at bygningarnir ikki yvirhalda ásetingarnar fyri mest loyvdu hædd.

Ætlanin er tó ikki, at økið við bygningin, sum verður nýttur til umsiting, skal broytast til A2 øki.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at byggisamtyktin verður broytt sambært tekning 102, dagf. 18.06.2004, og at nevndin mælir Matrikulstovuni til at loyva frámatrikulering av bygningum frá matr.nr. 1000a sambært tekning nr. 101, dagfest 18.06.2004.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. juli 2004:** Málið útsett til nøktandi upplýsingar fyriliggja viðvíkjandi framtíðar parkeringsviðurskifti í sambandi við umsóknina.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur móttikið nýggja umsókn, har søkt verður um at frábýta nú tríggjar bygningar ístaðin fyri sum upprunaliga 4. Í nýggju umsóknini verður haraftrat ført fram ynski um, at frávik verður givið til treytir um útvegan av parkeringsplássum. Mett verður í umsóknini, at ikki er neyðugt við meira enn 15 parkeringplássum til hvønn bygning.

Umsitingin hevur havt fund við umsøkjaran, har fingnar eru til vega upplýsingar um bygningarnar og verandi parkeringviðurskifti.

Um bygingarnar kann upplýsast:

| | | |
|---|---|---|
| Bygningur 53 | 60 | 1-kamaríbúðir |
| **Bygningur 54** | **40** | **1-verilsisíbúðir** |
| Bygningar 55 | 25 | 2-verilsisíbúðir |
| | 5 | 3-verilsisíbúðir |
| Samanlagt | 130 | Íbúðir |

Hetta merkir, at býtið til parkeringpláss í mun til bústaðir vil koma at verða.

| | | | |
|---|---|---|---|
| Bygningur 53 | 60 | 1-kamaríbúðir | 1/4 |
| Bygningur 54 | 40 | 1-verilsisíbúðir | 1/3 |
| **Bygningar 55** | **25** | **2-verilsisíbúðir** | |
| | 5 | 3-verilsisíbúðir | 1/2 |

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til, at byggisamtyktin verður broytt sambært tekning 102, dagf. 18.06.2004.

Harímóti mælir býararkitekturin frá at ganga umsóknini um at frábýta eftir nýggju umsóknini á møti, vísandi til at hetta ikki er í samsvari við ásetingarnar um krøv til parkering sambært almennu byggisamtykt fyri Tórshavnar kommunu.

Hinvegin kann nevndin, um so er, at hon ynskir at røkka eina loysn í málinum, samtykkja at gera eina serstaka byggiskipan fyri økið, har givið verður frávik í mun til galdandi ásetingar um krøvini til parkering í mun til bústaðir.

Slík serstøk byggiskipan kann grundast á, at talan er um smærri bústaðareindir, -íbúðarbústaðir, har ikki er tikin nóg væl hædd fyri býtinum millum bústaðarslag og parkering í vanligu ásetingunum.

Ein slík serstøk byggiskipan kann hava ásetingar um býti millum parkeringpláss í mun til bústaðir, ið er:

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Bygningur 53 | 60 | 1-kamaríbúðir | 1/2 | 30 P-pláss |
| Bygningur 54 | 40 | 1-verilsisíbúðir | 1/1 | 40 P-pláss |
| Bygningar 55 | 25 | 2-verilsisíbúðir | 1/1 | 25 P-pláss |
| | 5 | 3-verilsisíbúðir | 1/1 | 30 P-pláss |

Haraftrat skal treytast, at fyri bygningur 53 skal galda, at um so at støddin á bústaðareindunum broytist til størri eindir, skal ásetingin um býti broytast frá 1/2 til 1/1.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 4. apríl 2005:** Nevndin samtykti ikki at ganga umsóknini á møti, tí hon er ikki í samsvari við ásetingarnar um krøv til parkering sambært almennu byggisamtyktini.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur móttikið áheitan frá umsøkjaranum um at viðgera málið aftur við atliti til at gera eina ætlan fyr økið, sum hevur við sær frávik í mun til galdandi ásetingar til parkering.

Umsitingin hevur gjørt uppskot til ásetingar fyri økið. Talan er um somu ásetingar, sum býararkitekturin mælti til til fundin 4. apríl 2005.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til at taka undir við tilmælinum frá fundinum 4. apríl 2005.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. juni 2005**: Til tess at fáa býráðsins heimild til møguliga at fara víðari við málinum samtykti nevndin at leggja fyri býráðið fyri læstum hurðum tilmælið frá býararkitektinum um serstaka byggiskipan fyri økið sambært uppskoti 4. apríl 2005 við hesum ásetingum um parkeringspláss í mun til bústaðareindir.

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Bygningur 53 | 60 | 1-kamaríbúðir | 1/2 | 30 P-pláss |
| Bygningur 54 | 40 | 1-verilsisíbúðir | 1/1 | 40 P-pláss |
| Bygningar 55 | 25 | 2-verilsisíbúðir | 1/1 | 25 P-pláss |
| | 5 | 3-verilsisíbúðir | 2/1 | 10 P-pláss |
| Tilsamans | | | | 105 P-pláss |

**Býráðið fyri læstum hurðum 23. juni 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu at taka undir við tilmælinum frá býararkitektinum og at senda málið aftur í byggi- og býarskip-anarnevndina.

**Ískoyti:**
Nú er váttan komin frá MAP arkitektum vegna Almanna- og Heilsumálaráðið, um at teir ynskja, at málið verður viðgjørt víðari sambært treytunum, sum byggi- og býarskipanarnevndin samtykti 13. juni 2005.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til, at Almenna byggisamtyktin fyri Tórshavnar kommunu verður broytt sambært kortskjali.

Harafturat mælir býararkitekturin til sundurbýti sambært umsókn j. nr. 2004-1649 við fráviki viðv. hædd og parkeringsplássum treytað av, at ásetingar um tal av parkeringsbásum verður tinglisið í skeytini og kommunan hevur átalurætt.

| | |
|---|---|
| 1-kamaríbúðir | 1/2 P-pláss |
| 1-verilsisíbúðir | 1/1 P-pláss |
| 2-verilsisíbúðir | 1/1 P-pláss |
| 3-verilsisíbúðir | 2/1 P-pláss |

**Byggi- og býarskipanarnevndin 20. september 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 6. oktober 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

-Broytingin var lýst 17 oktober 2005 og seinasta freist at koma við mótmælum var 17. januar 2006.

Einki mótmæli var móttikið.

Síðani var málið sent til Innlendismálaráðið til góðkenningar.

Eftir tilmæli frá býarskipanarnevndini hjá landinum, kravdi Innlendismálaráðið at ein deklaratión var tinglisin á ognirnar um avmarking av møguleikum fyri broyting av útsjónd av bygningunum.

Eftir eitt langt samskifti við Innlendismálaráðið og umsøkjarnar vóru tær endaligu treytirnar sendar til Innlendismálaráðið tann 10. juli 2007, soleiðis at klárt skuldi verið at sundurmatrikulera ognirnar.

Síðani hevur tað víst seg at verða ein trupulleiki, at vegatgongdin til bygningarnar gongur ígjøgnum ognina hjá Landssjúkrahúsinum og er privat vegur. Harafturat er vegurin ov smalur, til at lúka krøvini í kap. V, §2 í Almennu byggisamtyktini.

Vegurin er gjørdur miðskeiðis í 60´árunum áðrenn byggisamtyktin fyri TK var gjørd. Vanliga vil tað verða kravt at treytirnar í byggisamtyktini verða eftirlúkaðar, tá ið broytingar verða gjørdar.

Hóast hetta eru vanliga treyturnar, má man rokna við at ferðslan ikki økist á hesum vegastrekkinum orsakað av matrikulerings- og byggisamtyktar broytingunum.

Ein máti at loysa trupulleikarnar er, at ein servituttur verður lisin á ognina hjá Landssjúkrahúsinum um, at tær frábýttu ognirnar skulu hava rætt til at koyra ígjøgnum vegin Eiragarður á matr. nr. 1000a. Eisini eigur man at krevja, at tað ikki skal byggjast meira á ognini hjá Landssjúkrahúsinum, sum kann skapa meira ferðslu á vegnum Eiragarður.

Harafturat eigur ein deklaratión at tinglýsast á frábýttu ognirnar um, at bygningarnir bert kunnu nýtast til íbúðir og felagsrúm fyri fólk ið býr á staðnum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og býararkitekturin mæla til, at sundurmatrikulering av blokkunum sambært fyrr samtyktu treytum verður góðkend og at
- sevituttur verður lisin á ognina matr. nr. 1000a hjá Landssjúkrahúsinum um at tær frábýttu ognirnar skulu hava rætt til at koyra ígjøgnum vegin Eiragarður á matr. nr. 1000a.
- at tað ikki skal byggjast meira á ognini hjá Landssjúkrahúsinum, sum kann skapa meira ferðslu á vegnum Eiragarður.

- deklaratión verður tinglýst á frábýttu ognirnar um, at bygningarnir bert kunnu nýtast til íbúðir og felagsrúm fyri fólk ið býr á staðnum

- servituttur verður lisin á ognina matr. nr. 1000a hjá Landssjúkrahúsinum um, at vatn- kloakk- og aðrar av verandi veitingarleiðingum hava rætt at verða íbundnar samsvarandi leiðingi og reinsiverk v.m. á matr. nr. 1000a og øðrum matriklum hjá Landssjúkrahúsinum/Landsstýrinum. Sama ger seg galdandi fyri møguligar nýggjar ella broyttar leiðingar frá frábýttu ognunum.

at "útstykkingardeklarasjón" verður lýst á stykkið hjá LSH og harvið á øll sundur-/frábýtt stykki – tó við tí viðmerking, at tá farleiðin Frælsið-Heygsvegur verður veruleiki, skal ferðslan til og frá teimum trimum frábýttu matriklunum verða frá hesari farleið og bert frá henni.

Og at málið verður sent teknisku nevnd til góðkenningar.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 4. mars 2008:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 6. mars 2008:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 27. mars 2008:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**73/08** **2006-1340**

Raðfesting av íløgum í smábátahavnir/smábátapláss.
Leinging av brimgarðinum á Argjum.

DHI hevur gjørt modelroyndir av bátahyli í Álakeri í sept./okt. 2006.

Í royndunum hevur dentur verið lagdur á, at umframt at tað skal vera kyrt í einari nýggjari bátahavn, skal kyrran í havnini í Tórshavn og í verandi bátahyli á Argjum ikki versna.

Úrslitið av modelroyndini, sum er komið, vísir, at tann rætningurin á brimgarðinum, sum gevur bestu kyrruna i Tórshavnar havn og nýggjum bátahyli í Álakeri, ger tað ókyrrari í verandi bátahyli á Argjum. Fyri at tað ikki skal gerast ókyrrari á Argjum, er neyðugt at leingja verandi brimgarð á Argjum.

Um brimgarðurin á Argjum verður longdur við 20 m, verður bátahylurin enn kyrrari enn hann er nú, men hetta gevur einki bátapláss.

Um brimgarðurin á Argjum verður longdur við 180 m, verður bátahylurin á Argjum enn kyrrari, enn um hann verður longdur við 20 m, og hetta gevur møguleika fyri 75 nýggjum bátaplássum.

Kostnaðarmeting er gjørd av ymiskum útbyggingrmøguleikum í Tórshavnar kommunu, sum útvega fleiri bátapláss.

| Stað | Bátapláss | Kostnaður |
|---|---|---|
| Álaker | 150 | 25,9 mió |
| Argir leingja brimgarð 20 m | 0 | 3,0 - |
| Argir leingja brimgarð 180 m og gerð av bátaplássum | 75 | 15,5 - |
| Gamlarætt hyl inn í lendið | 43 | 6,5 - |
| Gamlarætt hyl inn í lendið | 23 | 4,9 - |
| Signabø, verandi hylur | 50 | 2,7 - |

Í løtuni er tørvurin á bátaplássum nógv størstur í Tórshavn/Argjum.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjóri og havnameistarin mæla til at leingja brimgarðin á Argjum við 180 m og at gera pláss fyri 75 bátum at fíggja av konto fyri íløgur í smábátahavnir fyri 2007, 2008 og 2009.

**Fíggjarnevndin 17. januar 2007:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina, teknisku nevndina, havnanevndina og heilsu- og umhvørvisnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 5. februar 2007:** Samtykt at beina málið til umsitingina til víðari viðgerð.

**Havnanevndin 12. februar 2007:** Ein meiriluti Leivur Hansen, Annika Olsen, Høgni Mikkelsen og Jógvan Arge taka undir við tilmælinum frá kommunustjóranum, tekniska stjóranum og havnameistaranum.

Ein minniluti, Marin Katrina Frýdal, tekur støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 16. mai 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at játta kr. 1 mió. av íløgum í smábátahavnir til projektering og fyrireiking.

**Býráðið 24. mai 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

Fyrsta stigið at leingja brimgarðin á Argjum, og ger av tilhoyrandi bátaplássum og øki annars, er at søkja friðingarmynduleikarnar um loyvi.

Í §21 í løgtingslóg nr. 59 um verju av havumhvørvinum verður m.a. sagt *"Verkætlanir og virksemi á sjónum og fram við strondini, ið ávirka náttúru og umhvørvi munandi, kunnu ikki setast í verk uttan góðkenning frá landstýrismanninum."*

Fyri at tryggja okkum, at vit ikki bróta havumhvørvislógina, eigur landsstýrismaðurin at verða kunnaður um ætlanina, soleiðis at hann kann taka støðu til um útdýpingin kemur undir §21 í havumhvørvislógini.

Næsta stigið í ætlanini er at gera byggiprogram og skitsuuppskot.

**Tilmæli frá havnameistaranum:** Mælt verður til:
- at gera byggiprogram saman við teknisku umsitingini.
- at gera skitsuprojekt saman við ráðgevara.

**Havnarnevndin 12. november 2007:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 13. desember 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

-Bygginevndin varð endaliga skipað 30. januar 2008.

Byggiskrá er gjørd, og verður løgd fyri avvarðandi nevndir.

Um tað skal verða møguligt at byrja arbeiðið í 2008, má arbeiðið bjóðast út í seinasta lagi í viku 21, tí tað er ikki møguligt at byggja brimgarðin um veturin.

Útbjóðingin í viku 21 er treytað av:
- at tað ikki er neyðugt at broyta byggisamtyktina.
- at loyvi er komið frá friðingarnevnduni
- at Løgmálaráðið (Innlendismálaráðið) hevur váttað, at útbyggingin kann gerast uttan at árinskanning verður gjørd.

**Tilmæli frá havnameistaranum:** Mælt verður til at góðkenna byggiskránna, sum verður send víðari til avvarðandi nevndir.

**Havnarnevndin 18. februar 2008:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at taka undir við byggiskránni.

**Tekniska nevnd 6. mars 2008:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 12. mars 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við havnarnevndini.

**Býráðið 27. mars 2008:** Fyrst varð atkvøtt um tilmælið frá Marin Kathrinu Frýdal, um at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina til víðari viðgerð, fall við 6 atkvøðum fyri og 7 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Halla Samuelsen og Elin Lindenskov.

Ímóti atkvøddu: Leivur Hansen, Inga Dahl, Bjarti Mohr, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

Síðan varð atkvøtt um tilmælið frá fíggjarnevndini, treytað av at byggi og býarskipanar-nevndin góðkennur byggiskránna, ið var samtykt við 8 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Leivur Hansen, Inga Dahl, Bjarti Mohr, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

Greiddu ikki atkvøðu: Jógvan Arge, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Kathrina Frýdal, Halla Samuelsen og Elin Lindenskov

**74/08** <u>2007-2822</u>

**<u>Nýtt reinsiverk við Djúpagilsvegin</u>**

Vísandi til at kloakkarbeiðið verður gjørt frá Vegnum Langa og oman í Hoydalar er man varur við at nógv trýst er á reinsiverkið niðri í Hoydølum og er tað ein møguleiki fyri eini loysn við 2 stk.100 m³ plast tangum (Lapko).

Verandi reinsiverk í Hoydølum er upprunaliga ætlað til útstykkingina Oman Hoydalar.

Síðan er stórur partur av útstykkingini við Løgmannabreyt og Djúpagilsvegin eisini bundin í hetta reinsiverk, uttan at reinsiorkan er økt. Ùrslitið av hesum er, at tá áarføri er, fer meginparturin av mannatrekkinum og óhumskuni uttan um reinsiverkið út á sjógv niðri á Boðanesi.

Fyri at avlasta reinsiverkið, verður skotið upp at veita kloakkina í eitt nýtt reinsiverk við Djúpagilsvegin og binda frárenningina í ta nýggju ø500mm kloakkleiðingina, sum í løtuni verður løgd í Hoydølum. (smb. skitsu nr. 846-600 í málinum).

**Fíggjarig viðurskifti.**
Kostnaðarurin fyri arbeiðið er mettur at verða uml. 1,2 mió. kr.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at taka undir við uppskotinum og játta 1,2 mió. kr. at fíggja av íløgum fyri kloakkir í 2007, (reinsiverk við Súpanarvík og onnur verk) og at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 27. september 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 3. oktober 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 11. oktober 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

- Arbeiðið hevur verið boðið út í innbodna lisitatión (til 4 arbeiðstakarar), sum var hildin 19. februar 2008, kl.11.00. Inn vóru komin 2 tilboð, sum vóru frá sp/f R. Brockie og sp/f Maskinkoyring. Lægsta tilboðið var kr. 1.466.554,- u/mvg, og er hetta lægri enn kostnaðarmetingin, ið var kr. 1.764.900,-.

Samlaða kostnaðarmetingin, íroknað projektering, eftirlit, ókent og mvg, er mett til kr. 1.869.856 (smb. skjali nr. 2007-2822/5).

Býráðið hevur áður játtað 1,2 mió. kr. til verkætlanina (konto 1011-90-11892). Írestandi upphædd, álj. kr. 669.856, kann fíggjast av avlopi fyri verkætlanina Dalavegur/Torfinsgøta, stig I (konto 1011-90-11858).

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at taka av lægsta tilboðnum frá sp/f Maskinkoyring, og at fluttar verða kr. 669.856 av konto 1011-90-11858 til konto 1011-90-11892.

**Tekniska nevnd 6. mars 2008:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 12. mars 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 27. mars 2008:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**75/08** <u>1999-2006</u>

<u>**Venjingarskúlin: Viðv. parkeringsøki við fimleikahøllina á Stórheyggi**</u>

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Í skrivi, dagf. 13. september 1999, hevur skúlastjórin á Veningarskúlanum heitt á Tórshavnar kommunu um at gera parkeringsøki eystan fyri fimleikarhøllina.

**Ferðslunevndin 5. apríl 2000:** Tikið verður undir við principp uppskotinum hjá ferðslubólkinum, og at rekkverk verður uppsett við høvuðsinngongdina.

**Tekniska nevndin 8. juni 2000:** Samtykt at beina málið í mentamálanevndina

**Nýtt:**
Mentamáladeildin fekk málið 19. februar 2004.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og deildarleiðarin í mentamálum mæla mentamálanevndini til, at tekniska umsitingin, sum umsitur ferðsluspurningar, arbeiðir við áheitanini hjá skúlastjóranum, so fleiri parkeringspláss verða við fimleikahøllina.

**Nýtt:**
Umsitingin hevur fingið til vega uppskot frá ráðgeva. Uppskotið verður lagt fram á fundinum.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir nevndini til at taka støðu til framlagda uppskot sambært mannagongd í sambandi við verkætlan, sum skal fíggjast av kto fyri íløgur.

**Tekniska nevnd 26. juni 2006:** Nevndin tekur undir við uppskoti, dagf. 25. januar 2006. Umsitingin verður biðin um at koma við nýggjum uppskoti og kostnaðarmeting við fleiri p-plássum eystan fyri høllina at leggja fyri nevndina aftur.

**Nýtt:**
Umsitingin hevur fingið til vega nýtt uppskot til víðkan av parkeringsøkinum við ítróttarhøllina á Stórheyggi, við kostnaðarmeting. Uppskotið fer at bøta munandi um parkeringstrupulleikarnar á økinum kring høllina, á vegnum niðan til høllina og atkomumøguleikarnar hjá íbúgvum á økinum millum Landavegin og Stórheygg.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin meta, at tørvur er at fáa eina loysn á trupulleikunum á økinum við høllina, men vísandi til at eingin peningur er settur av til arbeiði av íløgum, mæla tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin til at bíða við verkætlanini.

**Tekniska nevnd 13. desember 2006:** Nevndin samtykti, at umsitingin letur gera annað uppskot at leggja fyri nevndina aftur (sambært j.nr. 9902006/11).

**Nýtt:**
Umsitingin hevur latið gjørt alternativt uppskot til parkering við høllina á Stórheyggi.

**Tekniska nevnd 8. mars 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við uppskoti nr. 3, j.nr. 1999-2006/22, móttikið 26. januar 2007, og at bjóða arbeiðið út í innbodnari lisitasjón, at leggja fyri nevndina aftur.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at taka undir við tilboðnum frá Sp/f Preben Hansen frá 6. september 2007 og at heita á býráðið um fíggjarnevndina um at játta 90.000,- kr. + MVG av íløgum fyri vegir 2007, til prosjektering og eftirlit, so arbeiðið kann bjóðast út, at leggja fyri nevndina aftur.

**Tekniska nevnd 27. september 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 3. oktober 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd og at játta kr. 96.000,00 av íløgum.

**Býráðið 11. oktober 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

-Málið verður lagt fyri byggi- og býarskipanarnevndina til kunningar.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at nevndin góðkennir ætlanina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 14. januar 2008:** Nevndin samtykti at góðkenna ætlanina.

- Umsitingin leggur fram úrslit av lisitatiónini. Í íløguætlanini fyri vegir í 2008 eru settar av 2 mill. til verkætlanina.

**Tekniska nevnd 7. februar 2008:** Nevndin samtykti at heita á býráðið um fíggjarnevndina at játta kr. 2.779.448,- av íløgum fyri vegir í 2008 til verkætlanina.

**Ískoyti:**
Arbeiðið var boðið út til P/f Hansen & Jacobsen, Kollafjørður og Sp/f Plan.

Lægsta tilboðið kr. 2.321.385,- uttan MVG, hevði Sp/f Plan sí j. nr. 1999-2006/42.

Samlaða kostnaðarmetingin fyri lægsta boðið, íroknað MVG, umsiting, prosjektbroyting og óvæntað, vísir ein fíggjartørv á kr. 2.779.448,- sí j. nr. 1999-2006/45.

Tað eru í 2007 játtaðar kr. 96.000,- til prosjektering, prosjektuppfylging og fakeftirlit (kr. 90.000 + mvg). Í íløguætlanini fyri vegir í 2008 eru settar av kr. 2 mill. til verkætlanina. Í mun til samlaðu kostnaðarmetingina á kr. 2.779.448,- er sostatt neyðugt við eini eykajáttan á kr. 689.448,- til fígging av verkætlanini.

**Fíggjarnevndin 12. mars 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka av lægsta tilboðnum, og at játta 2.780.000,00 av íløgum fyri vegir í 2008.

**Býráðið 27. mars 2008:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**76/08** **2008-0512**

**Umsókn frá grunninum Føroyskt Sjósavn, dagfest 6. september 2007, um skættafrælsi**

**Lýsing av málinum – samandráttur.**
Søkt verður um skattafrælsi í sambandi við virksemi grunnsins, sum ikki er inntøkugevandi virksemi.

Taks biður í skrivi 18. februar 2008 um býráðsins álit.

**Tilmæli**
Kommunustjórin mælir til at lata skattafrælsi sambært § 3, stk. 3, í skattalógini.

**Fíggjarnevndin 12. mars 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum frá kommunustjóranum.

**Býráðið 27. mars 2008:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**77/08** **2008-0275**

**Val av valstýri fyri atkvøðuøkið Velbastaðar, Kirkjubø og Syðradalur til býráðsvalið 11. november 2008**

Sbrt. § 8, stk. 3, í lóg nr. 44 frá 19. juni 1972 um val til allar føroyskar kommunur, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 97 frá 15. november 2006, stílar serligt stýri við valstýrarum fyri valinum í atkvøðuøkinum Velbastaðar, Kirkjubø og Syðradalur og Kaldbaksbotnur til býráðsvalið 11. november 2008, sum er sett av býráðnum, og sum hevur í minsta lagi 3 limir.

**Býráðið 31. januar 2008:** Útsett.

**Býráðið 28. februar 2008:** Uppskot frá Annfinn Brekkstein, um at avtaka valstaðið fyri Velbastað, Kirkjubø og Syðradal varð ikki viðgjørt. Málið tikið av skrá.

**Býráðið 27. mars 2008:** Vald vóru

Jógvan Frýdal
Ragnhild Sandoy
Súsanna Andreasen
Bjarnhild Patursson

**78/08** **2004-1691**

**Fimleikahøll við norðara enda av Tórsvølli**

Um málið verður liðugt til samtyktar, kemur hetta fyri við tilmæli frá mentamálanevndini og fíggjarnevndini.

**Býráðið 27. mars 2008:** Tikið av skrá.

**79/08** **2008-0873**

**Upplegg frá KSF um samanlegging**

**Býráðið 27. mars 2008:** Tikið av skrá.

## Mál uttan fyri skrá

**80/08** **2005-0416**

**Mál viðv. bussleiðini**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Bussambandið er sera vánaligt til Velbastað og Kirkjubø, serliga seinnapartar.

**Kirkjubøar- og velbastaðarnevndin 15. oktober 2007:** Nevndin heitir á teknisku nevnd um at betra um viðurskiftini millum kl. 15.00–20.00, evt. við tilkalling.

**Ískoyti:**
Vísandi til at bussambandið til Velbastaðar og Kirkjubøar ikki er nøktandi, hava borgarar og staðbunda nevdin fleiri ferðir heitt á kommununa um at betra sambandið. Víst hevur verið m.a. til bussambandið til Kaldbaks og Kollafjarðar, ið hevur nógv betur samband. Harumframt hava tær bygdirnar fleiri túrar í dagtímunum og um vikuskiftið, har Velbastað og Kirkjubø einki samband hevur.

Sambært Hildur Jenssdóttir, ið hevur yvirtikið sáttmálan um busskoyring til Velbastað og Kirkjubø, verður árligi kostnaðurin fyri at víðka bussleiðina við t.d. 2 túrum, sum ynskiligt er, álj. kr. 200.000,-.

**Tekniska nevnd 17. januar 2008:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Elin Lindenskov og Sjúrður Olsen, samtykti at víðka bussleiðina við tveimum túrum gerandisdagar og heita á býráðið umvegis fíggjarnevndina at útvega kr. 200.000,- afturat konto 18.

Ein minniluti, Leivur Hansen, tekur støðu á fíggjarnevndarfundi.

**Fíggjarnevndin 23. januar 2008:** Ein meirilutin, Heðin Mortensen, Leivur Hansen, Jan Cristiansen og Høgni Mikkelsen, samtykti at beina málið aftur í teknisku nevnd við áheitan um at taka málið uppaftur til viðgerðar, tá nýggja starvsfólkið til umsiting av bussleiðini á teknisku plandeildini er sett.

Ein minniluti, Jógvan Arge tekur undir við meirilutanum í teknisku nevnd.

**Tekniska nevnd 7. februar 2008:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Elin Lindenskov og Sjúrður Olsen, mælti til at beina málið aftur í fíggjarnevndina við umbøn um at fíggja víðkanina.

Ein minniluti, Høgni Mikkelsen og Leivur Hansen, mælir til at taka undir við meirilutanum í fíggjarnevndini frá 23. januar 2008.

**Fíggjarnevndin 20. februar 2008:** Ein meiriluti, Jan Christiansen, Leivur Hansen, og Høgni Mikkelsen, samtykti at útseta málið til nýggja starvsfólkið til umsiting av bussleiðini á teknisku plandeildini er sett.

Ein minniluti, Jógvan Arge og Elin Lindenskov tekur undir við meirilutanum í teknisku nevnd.

Staðbundnu limirnir ynskja frágreiðing.

**Kirkjubøar- og velbastaðarnevndin 5. mars 2008:** Kunnað varð um málið. Nevndin er ónøgd við busssambandið, har eingin ruta er millum kl. 17.00-22.00, har serliga ungdómurin hevur tørv á ferðasambandinum fyri at kunna luttaka í ítrivvirksemi v.m. í Havn.

**Ískoyti:**
Marin Katrina Frýdal mælir til at játta kr. 200.000 av reguleringskontuni til busskoyringina millum Kirkjubø, Velbastað og Tórshavn soleiðis, at túratalið økist við tveimum túrum gerandisdagar.

**Býráðið 27. mars 2008:** Atkvøtt um tilmælið frá Leivur Hansen, um at beina málið aftur í fíggjarnevndina, ið varð samtykt við 8 fyri og 4 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Leivur Hansen, Inga Dahl, Bjarti Mohr, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

Ímóti atkvøddu: Hildur Eyðunsdóttir, Marin Kathrina Frýdal, Halla Samuelsen og Elin Lindenskov.

Greiddi ikki atkvøðu: Jógvan Arge.

**FUNDUR LOKIN KL. 20:40**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Jógvan Arge | Leivur Hansen | Hildur Eyðunsdóttir |
| Marin Katrina Frýdal | Halla Samuelsen | Elin Lindenskov |
| Inga Dahl | Bjarti Mohr | Beate L. Samuelsen |
| Sjúrður Olsen | Annfinn Brekkstein | Jan Christiansen |
| | Heðin Mortensen | |